KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 24.04.2014 kl. 19:00

Málsyvirlit		
Til viðgerð		
39/14	14/00384	Val av tiltakslimi í nevndina hjá SEV
40/14	14/00276	Matstovu- og skeinkiloyvi til matstovuna Jacqson - Politiið í Føroyum
41/14	12/01079	Mannagongd fyri avgreiðslu av við- ella frámælum í samb. við skeinkiloyvir
42/14	13/00826	Umsókn um skattafrælsi - Kl. Sjónleikarafelag
43/14	13/01092	Umsókn um skattafrælsi - Kl. Badmintonfelag II
44/14	14/00245	Marknaumskipan millum matr. nr. 651a, 650a og 639 við Vágsheygsgøtu
45/14	14/00254	Sundurbýti og samanlegging í Mikladali
46/14	11/00160	Uppskot um umskipan av skúlabygnaðinum í Klaksvík - støðutakan til bygnað
47/14	14/00395	Konta til ráðgeving - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
48/14	14/00202	Nýggjur lastbilur til Vegadeildina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
49/14	14/00211	Fastognir - óbrúkt játtan - framflyting frá 2013 til 2014 - *seinna viðgerð*
50/14	14/00227	Kl. Havn - óbrúkt játtan - framflyting frá 2013 til 2014 - *seinna viðgerð*
51/14	14/00125	Framflyting av upphædd til 2014, Heimið við Vágna - *seinna viðgerð*
52/14	13/00054	Stormskaðar 2013/2014 - Umvælingarkostnaður í 2014 - *seinna viðgerð*
53/14	14/00224	Svínoy; rennigravari - flyting millum kontur - *seinna viðgerð*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

39/14
14/00384 Val av tiltakslimi í nevndina hjá SEV

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	39/14	

Frágreiðing um málið:
Hvannasunds kommuna hevur sent Klaksvíkar Kommunu skriv dagfest 25. mars 2014, har tey ynskja nýggjan varalim í nevndina hjá SEV í staðin fyri verandi varalim Katrin Næs. Nýggjur varalimur verður Irdi Jacobsen, býráðslimur í Hvannasunds Kommunu.
Borgarstjórin í Klaksvík hevur boðað SEV frá hesi broyting.
Sostatt verður Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur í Klaksvík, limur og Irdi Jacobsen, býráðslimur í Hvannasundi, varalimur í nevndini fyri SEV.

Lógargrundarlag:
Grein 4, stk. 2 í viðtøkum elfelagsins.

Tilmæli:
Býráðið verður at staðfesta hesa broyting.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt, at Irdi Jacobsen verður varalimur fyri Steinbjørn O. Jacobsen í nevndini fyri SEV.

40/14
14/00276 Matstovu- og skeinkiloyvi til matstovuna Jacqson - Politiið í Føroyum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	08.04.2014	24/14	
2 Havna- og Vinnunevndin	08.04.2014	24/14	
3 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	40/14	

Frágreiðing um málið:
Í sambandi við at nýtt sølustað letur upp við Klaksvíksvegin, verður søkt um matstovu- og skeinkiloyvi.
TU hevur kannað fyriliggjandi tekningar, sum staðið verður bygt eftir. Um so er, at hesar verða fylgdar, hevur TU onga viðmerking.

Lógargrundarlag:
Rúsdrekkalógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin viðmælir loyvisnevndini at ganga umsóknini á møti.

Samtyktir
MeN 08-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagfest 31. mars 2014.

HaVN 08-04-2014: Ein meiriluti í nevndini, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Gunvá við Keldu og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við viðtøkuni hjá MeN 08-04-2014. Ein minniluti, Herfrí J. Sørensen, tekur ikki undir við, at skeinkiloyvið er galdandi uttanfyri.

BýR 24-04-2014: Samtykt at taka undir við meirilutanum í HaVN 08-04-2014 við 9 atkvøðum fyri (JS, ÓK, JL, SVJ, KEZ, GvK, EÓP, EMG og ASJ) og 2 ímóti (HJS og SOJ).

41/14
12/01079 Mannagongd fyri avgreiðslu av við- ella frámælum í samb. við skeinkiloyvir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	08.04.2014	19/14	
2 Havna- og Vinnunevndin	08.04.2014	23/14	
3 Fíggjarnevndin	22.04.2014	35/14	
4 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	41/14	

Frágreiðing um málið:
Smb. §11 í Rúsdrekkalógini skal ummæli verða fingið frá bý- ella bygdarráðnum, áðrenn loyvisnevndin kann geva loyvi til útskeinking. Ein treyt er, at virksemið frammanundan hevur matstovuloyvi

Vísandi til, at býráðið bert hevur fund eina ferð um mánaðin og als ikki hevur fund í juli og august, og tað tí kann gerast trupult at avgreiða slíkar umsóknir smidliga, hevur umsitinigin kannað eftir, um nakað forðar fyri, at hesi ummæli verða avgreidd umsitingarliga. Smb. løgfrøðinginum hjá Kommunufelagnum er onki sum forðar fyri, at ummælini verða avgreidd umsitingarliga. Umsitingin hevur eisini havt samband við umboð fyri Politiið í viðgerðini. Eisini skal umsitingin vísa á, at aðrar kommunur - eitt nú Tórshavnar kommuna - avgreiða slík viðurskifti reint umsitingarliga.

Mannagongdin nú er, at ummælir viðv. *leingjan av verandi* ella *útskrivan av fyribils* loyvum, *styttri enn eitt ár*, verða avgreidd umsitingarliga, meðan ummælir um ***nýggj*** loyvir skulu fyri nevnd og býráð, áðrenn tey kunnu latast politii og loyvisnevnd.

Lógargrundarlag:
Rúsdrekkalógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin

Tilmæli:
Mælt verður til, at nýggj mannagongd verður staðfest, har ummælir av umsóknum um Matstovu- og Skeinkiloyvir verða avgreidd umsitingarliga.

Samtyktir

MeN 08-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 6. mars 2014

HaVN 08-04-2014: Ein meiriluti í nevndini, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen og Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við viðtøkuni hjá MeN 08-04-2014. Ein minniluti í nevndini, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, mælir til at halda fast við verandi skipan.

FíN 22-04-2014: Nevndin tekur undir við MeN 08-04-2014 og meirilutanum í HaVN 08-04-2014.

BýR 24-04-2014: Samtykt at taka undir við MeN 08-04-2014 og meirilutanum í HaVN 08-04-2014 við 7 atkvøðum fyri (JS, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP og ASJ) og 4 ímóti (SOJ, EMG, GvK og HJS).

42/14
13/00826 Umsókn um skattafrælsi - Klaksvíkar Sjónleikarafelag

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	**08.04.2014**	**21/14**	
2 Fíggjarnevndin	**22.04.2014**	**39/14**	
3 Klaksvíkar Býráð	**24.04.2014**	**42/14**	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini dagfest 25. mars 2014, har greitt verður frá, at Klaksvíkar Sjónleikarafelag søkir um skattafrælsi. TAKS-ráðið er málsviðgeri, men skal fáa sær álit frá avvarðandi býráði, áðrenn ráðið tekur endaligu avgerð í málinum.
Viðtøkur felagsins eru dagførdar 19. juni 2013, men annars er felagið gamalt. Endamálið hjá felagnum er at fremja góðan sjónleik og at arbeiða fram ímóti, altíð at hava bestu karmar til sjónleik og annað líknandi mentanarvirksemi.
Sum viðtøkurnar eru orðaðar, kunnu vit ganga út frá, at virksemið hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag kemur undir heitið «manngóð endamál», sum er nevnt í § 3, stk. 3 í skattalógini og § 2 í kunngerð nr. 86 frá 19. oktober 1999, og harvið er heimild at játta skattafrælsi.

Tilmæli:
Umsitingin hevur einki at viðmerkja til TAKS-ráðið í samband við teirra málsviðgerð av umsóknini hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag at fáa skattafrælsi.

Samtyktir
MeN 08-04-2014: Nevndin tekur undir við, at skattafrælsi verður veitt.

FíN 22-04-2014: Nevndin tekur undir við MeN 08-04-2014.

BýR 24-04-2014: Samtykt

43/14

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

13/01092 Umsókn um skattafrælsi, Kl. Badmintonfelag II

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	08.04.2014	22/14	
2 Fíggjarnevndin	22.04.2014	40/14	
3 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	43/14	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini dagfest 25. mars 2014, har greitt verður frá, at Kl. Badmintonfelag II søkir um skattafrælsi. TAKS-ráðið er málsviðgeri, men skal fáa sær álit frá avvarðandi býráði, áðrenn ráðið tekur endaligu avgerð í málinum.
Í reglugerðini stendur, at felagið er stovnað 25. september 2013. Endamálið hjá felagnum er at virka til frama fyri badminton.
Sum viðtøkurnar eru orðaðar, kunnu vit ganga út frá, at virksemið hjá Kl. Badmintonfelag II kemur undir heitið «manngóð endamál», sum er nevnt í § 3, stk. 3 í skattalógini og § 2 í kunngerð nr. 86 frá 19. oktober 1999, og harvið er heimild at játta skattafrælsi.

Tilmæli:
Umsitingin hevur einki at viðmerkja til TAKS-ráðið í samband við teirra málsviðgerð av umsóknini hjá Kl. Badmintonfelag II at fáa skattafrælsi.

Samtyktir
MeN 08-04-2014: Nevndin tekur undir við, at skattafrælsi verður veitt.

FíN 22-04-2014: Nevndin tekur undir við MeN 08-04-2014.

BýR 24-04-2014: Samtykt.

44/14
14/00245 Marknaumskipan millum matr. nr. 651a, 650a og 639 við Vágsheygsgøtu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.04.2014	26/14	
2 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	44/14	

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um býráðins ummæli til marknaumskipan millum matr. nr. 650a og 639 og 651a.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan ikki partur í málinum

Tilmæli:

Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið aftur við tilmæli um at játta marknaumskipanini.

Samtyktir
UBN 07-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 01-04-2014.

BýR 24-04-2014: Samtykt.

45/14
14/00254 Sundurbýti og samanlegging í Mikladali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.04.2014	27/14	
3 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	45/14	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv dagf. 27.01. 2014 frá Advokatskrivstovuni til Umhvørvisstovuna, sum síðani hevur sent Klaksvíkar Kommunu málið til ummælis. Talan er um sundurbýti og samanlegging í samband við sølu av jørð i Mikladali.
Allir teir umrøddu jarðateigarnir liggja uttanfyri byggisamtyktina, og eru sostatt at rokna sum landbúnaðarøki, við undantak av parti av matr. nr. 34 nf. veg á Kambsgarði, sum er útlagt sum vinnuøki (merkt B20 í Byggisamtyktini).

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan er ikki partur

Tilmæli:
Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið aftur við tilmæli um at játta umsóknini, samstundis sum víst verður á byggisamtyktarligu ásetingarnar fyri part av matr.nr. 34.

Samtyktir
UBN 07-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest tann 01-04-2014.

BýR 24-04-2014: *Herfrí J. Sørensen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Samtykt.

46/14
11/00160 Uppskot um umskipan av skúlabygnaðinum í Klaksvík - støðutakan til bygnað

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	24.04.2014	17/14	
2 Fíggjarnevndin	24.04.2014	43/14	
3 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	46/14	

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 20. februar 2014 samtykti býráðið tilgongdina fyri viðgerðina av skúlabygnaðinum og ta eftirfylgjandi tilgongdina fyri víðari skúlabyggingina. Ein partur av samtyktu tíðarætlanini er, at býráðið á reglugliga býráðsfundinum í apríl-fundarumfarinum skal viðgera og taka støðu til:

a) tilmælið frá bygnaðarbólkinuim
b) víðari tilgongdina fyri skúlabyggingina
c) biðja byggibólkin taka arbeiði sítt uppaftur

Sí nevndar- og býráðssamtyktir í februar av tilmælum, dagfest 06-02-2014 og 18-02-2014.

Tilgongdin í arbeiðnum hjá bygnaðarbólkinum, sum býráðið setti, er nú komin hartil, at bólkurin á dagsfundi mikudagin 23. apríl 2014, dagin fyri býráðsfundin, fer at viðgera endaliga og koma við tilmæli um framtíðar skúlabygnað.

Síðan verða eykafundir í Trivnaðarnevndini Børn & Ung og í Fíggjarnevndini hósdagin 24. apríl 2014, har hetta málið verður einasta mál á skrá.

Málið verður síðan lagt fyri hendan býraðsfundin við teimum tilmælum, sum tá fyriliggja frá bygnaðarbólkinum, Trivnaðarnevndini B&U og frá Fíggjarnevndini.

Lógargrundarlag:
Fólkaskúlalógin.

Tilmæli:
Fyriliggur til býráðsfundin.

Samtyktir
TrN B&U 24-04-2014: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í bygnaðarbólkinum, dagfest 23.04.14.

Nevndin mælir til, at byggibólkurin tekur sítt arbeiði upp aftur og verður víðkaður samsvarandi Fólkaskúlalógini § 52 stk. 3. Og at byggibólkurin verður mannaður soleiðis: Jóhann Lützen, formaður í TRN B&U, ið heldur fram sum formaður í byggibólkinum, Eyðstein Poulsen, limur í TRN B&U, Jógvan Skorheim, borgarstjóri, Vivian Guðjónsson, virkandi skúlastjóri við Skúlan á Ziskatrød, Mildrid á Lógv, forkvinna í skúlastýrinum við Skúlan á Ziskatrød, Eyðbjørn Jacobsen, læraraumboð fyri Skúlan á Ziskatrød, Símin Petur Hjelm, skúlastjóri við Ósáskúlan, Karl Birgir Isaksen, formaður í skúlastýrinum við Ósáskúlan, Tóra við Keldu, læraraumboð fyri Ósáskúlan, Nikolina Olsen, umboð fyri skúlastýrið í Mikladali/Trøllanesi, Karl Jakob Ósá, tekniskur stjóri, John Færø, trivnaðarstjóri og Tonja Ziskason, toymisleiðari Børn & Ung.

FíN 24-04-2014: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við TrN B&U, dagfest 24-04-2014. Ein minniluti, Óluva Klettskarð og Atli S. Justinussen, tekur støðu í býráðnum.

BýR 24-04-2014: Samtykt at taka undir við tilmælinum frá TrN B&U 24-04-2014, meirilutanum í FíN 24-04-2014 og soljóðandi broytingaruppskoti: "*Skotið verður upp at taka undir við meirilutauppskotinum, samstundis sum samtykt verður, at býráðið bjóðar foreldrum/børnum við happingartrupulleika annan skúlamøguleika. Og at býráðið tekur stig til eina tilgongd, so leiðsla og lærarar verða hugað at fremja samanleggingina, so henda verður framd á skilabesta hátt til frama fyri skúla og næmingar*" við 8 atkvøðum fyri (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP og HJS) og 3 ímóti (GvK, EMG og ASJ).

47/14
14/00395 Konta til ráðgeving - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	22.04.2014	41/14	
2 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	47/14	
3 Klaksvíkar Býráð	22.05.2014		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini dagfest 16. apríl 2014 har m.a. víst verður á, at tørvur er á eini serstakari kontu til ráðgevingarútreiðslur, ið býráðsleiðslan skal hava ábyrgd av og umsita. Soleiðis at býráðsleiðslan kann taka støðu til einstøku málini og verkætlanirnar, tá ið hesar íkoma. Játtanin til ráðgevingarútreiðlurnar verður løgd undir kontobólkin "Umsiting annað".

Í sambandi við málið um Kópakonuna varð fremjingin av tí málinum broytt frá at vera eitt stuðulsmál innan rakstur til eina íløgu, og varð játtanin til verkætlanina tí flutt frá rakstrarsíðuni til at verða ein íløgujáttan.

Nevnda bókhaldsliga broyting lækkar ta samlaðu rakstrarjáttanina við kr. 200.000,- sum við hesum verður mælt til at veita sum ein eykajáttan til hetta endamál.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin. Talan er um eina eykajáttan, sum tí krevur tvær býráðssamtyktir, fyrru ferð í apríl og seinnu ferð í mai mánað.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eykajáttanin verður fíggjað av tøka peningi kommununnar.

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við málinum sum omanfyri standandi greinað, og at hetta verður fíggjað sum ein eykajáttan av tøka peningi kommununnar.

Samtyktir
FíN 22-04-2014: Ein meiriluti í nevndini, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Signhild V. Johannesen og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 16-04-2014, og at peningurin í 2014 í samráð við nevndarformenninar verður nýttur til barna- og ungdómspolitikk og til tilgongdina at skipa eldraøkið, umframt at málið verður tikið uppaftur í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2015.

Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur støðu í býráðnum.

BýR 24-04-2014: Tilmælið frá meirilutanum í FíN, dagfest 22-04-2014, samtykt við 9 atkvøðum fyri (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP, EMG og HJS) og 2 atkvøðum ímóti (GvK og ASJ).

48/14
14/00202 Nýggjur lastbilur til Vegadeildina - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.04.2014	29/14	
2 Tekniska Nevnd	09.04.2014	14/14	
3 Fíggjarnevndin	22.04.2014	38/14	
4 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	48/14	
5 Klaksvíkar Býráð	22.05.2014		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting dagfest 28. feb. 2014, har víst verður á, at standurin á bila- og maskinpark vegadeildarinnar er vánaligur. Flestu amboðini eru sera gomul, og tí er neyðugt við endur-nýggjan. Eitt av hesum amboðum er lastbilurin hjá vegadeildini, sum er sera nógv slitin.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ein rakstrarupphædd á kr. 400.000,- skal flytast frá ”Vegir, asfalteringsviðlíkahald” til ”Maskinur, Íløgur”. Sambært hesum minkar rakstrarsíðan á fíggjarætlanini fyri 2014 við 400.000 kr, og íløgusíðan hækkar við somu upphædd. Tekur UBN undir við málinum, skal ein upphædd á kr. 250.000,- flytast frá ”Kloakkir, Íløgur” til “Maskinur, Íløgur”. Sølan av MAN-lastbilinum krevur, at kontan ”Maskinur, Íløgur” fær eina inntøku á kr. 100.000,-, sum verður at nýta til part av fíggingini.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri nevndir og býráð til viðgerðar og støðutakan.

Samtyktir
UBN 07-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TU, dagfest tann 28-02-2014.

TN 09-04-2014: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 28-02-2014.

FíN 22-04-2014: Nevndin tekur undir við UBN 07-04-2014 og TN 09-04-2014.

BýR 24-04-2014: Samtykt.

49/14
14/00211 Fastognir, óbrúkt játtan - framflyting frá 2013 til 2014 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	20.03.2014	27/14	
2 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	49/14	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av Býráðnum 20-03-2014.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt.

50/14
14/00227 Kl. Havn, óbrúkt játtan - framflyting frá 2013 til 2014 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	20.03.2014	30/14	
2 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	50/14	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av Býráðnum 20-03-2014.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt.

51/14
14/00125 Framflyting av upphædd til 2014, Heimið við Vágna - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	20.03.2014	31/14	
2 Klaksvíkar Býráð	24.04.2014	51/14	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av Býráðnum 20-03-2014.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt.

52/14
13/00054 Stormskaðar 2013/2014 - Umvælingarkostnaður í 2014 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað

1 Klaksvíkar Býráð	**20.03.2014**	**29/14**	
2 Klaksvíkar Býráð	**24.04.2014**	**52/14**	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av Býráðnum 20-03-2014.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt.

53/14
14/00224 Svínoy; rennigravari - flyting millum kontur - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	**20.03.2014**	**28/14**	
2 Klaksvíkar Býráð	**24.04.2014**	**53/14**	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av Býráðnum 20-03-2014.

Samtyktir
BýR 24-04-2014: Samtykt